# Vilja fáa frið at svølgja kamelar

**Jóannes Eidesgaard biðjur nú sínar samgongufelagar um at sláa kalt vatn í blóðið og halda uppat at skeldast í fjølmiðlunum. Men hjá onkrum samgongumonnum rínur ikki við**

Áki Bertholdsen

Tað ringasta, sum kann henda, er samgongufólk hvør í sínum lagi fara í fjølmiðlarnar at skeldast um førda politikkin.

Tað heldur Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður í fíggjarmálum.

Í tíðindaskrivi fríggjadagin staðfesti hann, at honum hóvar als ikki, at politikarar í samgonguni javnan og savnan eru í fjølmiðlunum við útsøgnum um, hvussu ósamdir teir eru um tær politisku ætlanirnar, sum aðrir politikarar í samginguni hava.

Hann minnir á, at samgongan er í ferð við at gera fíggjarlógina fyri 2011 og at tað verður ein serstakliga tórfør og viðbrekin uppgáva.

– Her verða nógvir herskni kamelar, ið skulu slúkast, um vit skulu bera boð í bý við okkara fíggjarlóg, sigur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum.

– Tað ringasta, vit nú kunnu gera, er at fara út í pressuna við staklutum og fáa ein orðadrátt millum samgongufólk um hesi, sigur hann

– Á henda hátt náa vit ikki málinum, leggur hann afturat

Sostatt mælir hann politikarum úr samgonguni til at sláa kalt vatn í blóðið og at geva landsstýrinum arbeiðsfrið.

– Tær politskur uppskotini skulu viðgerast innanhýsis í samgonguni, sigur hann.

Hann heitir í sama viðfangi á sínar samgongufelagar um at fáa øll spariuppskotini á samgonguborðið eftir summarsteðgin so at tey kunnu verða viðgjørd í samgonguni og ikki sum nú úti í fjølmiðlunum.

– Uppgávan verður nóg trupul, sum er og tað er eingin orsøk er at leggja okkum sjálvum fótonglar í vegin, sigur Jóannes Eidesgaard.

### Rínur ikki við

Men hendan áheitanin frá landsstýrismanninum rínir ikki við allastaðni.

Longi dagin eftir var Edmund Joensen í miðlunum við einum hvassorðaðari grein, har hann skuldsetti javnaðarflokkin fyri at renna undan sínum egna skugga og fyri at stinga Rósu Samuelsen, landsstýriskvinnu, í bakið.

*aki@sosialurin.fo*

# Bárður Johannesen á fløgu

**Bárður Johannesen gevur í næstum fløgu út, ið hevur heitið Ancient Fotgotten Stories.**




Dagfinn Olsen

Bárður Johannesen gevur í næstum fløgu út við løgum og orðum, ið hann sjálvur hevur smíðað. Fyrsta lagið er longu tókt á netinum og kann takast niður á Planet.fo. Lagið kallast Allmost There.

Bárður sigur um lagið, at tað ikki er umboðandi fyri alt tilfarið á fløguni, men at stílurin er tað, ið flokkast undir nýtt latina. Bland av jazzi, poppi og fólkatónleiki.

Fløgan hjá Bárði Johannesen kemur ætlandi út í august 2010.

Fløguheitið kemur av lagnum Ancient Forgotten Stories, ið eisini verður tókt á Planet.fo. Bárður fekk íblástur til lagið úr tveimum myndum hjá William Heinesen.

Bárður Johannesen er 28 ára gamal og er av Argjum. Hann hevur í eina tíð, og metir nú, at stundin er komin til handa at geva fløgu út. Fløgan er tikin upp í Bloch Studio á Bryggjubakka.

*dagfinn@sosialurin.fo*




*Hesi ungu fólkini hava fingið frálæru í filmsgerð*

# Ungfólk á filmsskúla í Nólsoy

**FILMSSKÚLI** 12 ungfólk hava í eina viku verið ígjøgnum eina intensa og læruríka gongd, har endamálið hevur verið at lært tey at gera film.

Eyðun Klakstein

Hollywood pluss Nólsoy gevur Nollywood, og Nóllywood er filmssummarskúli fyri ung millum 13 og 17 ár, sum farnu vikuna hevur verið í Nólsoy. 12 luttakarar hava í eina viku verið ígjøgnum eina intensa og læruríka gongd, har endamálið hevur verið at lært tey at gera film.

Fyrstu dagarnar arbeiddu tey í smærri bólkum við bundnum uppgávum. Síðani hava tey sjálvi gjørt hugskot, leikrit, storyboard, upptøkulista og annað. Tey hava síðani valt leiklutir, so øll hava haft teirra egna ábyrgdarøki, tá tey fóru undir stóru felagsuppgávuna: At gera ein fimm minuttir langan stuttfilm – frá hugskotið til lidna framleiðslu.

Forðingarnar á vegnum hava ikki skortað: Veðrið var ikki heilt eftir vild, onkrar tekniskar avbjóðingar vóru – og so fór streymurin mitt í klippingini.

Tiltakið endaði við filmssýning sunnudagin.